*Texaco, Amerada Hess og BP:*

# Áhugaverd boring skamt frá markinum

*-Eg kann ikki siga nakað um seinastu boring okkara tætt upp at føroyska markinum, tí hetta er so nær tí umstridda økinum millum Bretland og Føroyar. Soleingi marknatrætan millum Føroyar og Bretland ikki er loyst vilja oljufeløg upplýsa sum minst*



*Bent Baumbach frá Texaco*

Hetta sigur Bent Baumbach, ið starvast sum geofysikari hjá stóra amerikanska oljufelagnum Texaco. Við hesum sipar hann til seinastu boringina hjá Texaco og oljufelagnum Amerada Hess stutt frá føroyska fiskimarkinum.

Boriholið, sum á fakmáli verður rópt "a tight hole", tvs. at allir upplýsingar verða hildnir loyniligir, er í blokkinum 204 og liggur nakað sunnari og vestari enn oljukeldan Conival, sum BP sigst at hava funnið í fjør, men sum eisini er loynilig. Bæði hesi boriholini liggja væl nærri føroyska markinum enn stóra oljukeldan Foinaven, sum byrjar framleiðslu í mars mánað næsta ár.

Sosialurin skilir, at nyggjasta boringin hjá Texaco og Amerada Hess er nærri miðlinjuni enn nøkur boring áður. Talan er um fáar kilometrar. Hon er úti á sjálvari hellingini.

Teir góvust at bora har fyri tveimum vikum síðani. Á Texaco siga teir, at orsøkin til at borað hevur verið so seint úti á árið er tann, at veðrið hevur verið so gott og at teir hava verið so heppnir at hava ein boripall. Tað er nevniliga so, at oljufeløgini í løtuni kappast um at fáa boripallar, sum kunnu brúkast til tey stóru dýpini. Talan er um einar seks tilsamans í heiminum, sum kunnu brúkast í Hetlandsrennuni og har um leiðir.

Bent Baumbach dylir ikki fyri, at óloysta marknatrætan millum Føroyar og Bretland er medvirkandi til, at oljufeløgini gera alt fyri at goyma upplýsingar um, hvat tey møguliga hava funnið nærhendis teimum umstriddu økjunum.

Hetta er helst eisini ein av orsøkunum til, at vit hava frætt so lítið til ta nyggjastu boringina hjá bretska oljufelagnum BP somuleiðis skamt frá fiskivimarkinum. BP endaði hesa boring fyri góðum mánað síðani. Teir brúktu boripallin Ocean Alliance, meðan Texaco hevur brúkt pallin Dyvi Stena, báðir kendir frá stóru fundunum, sum eru gjørd vestan fyri Hetland.

Texaco er millum oljufeløgini, sum eru hugað fyri at fara undir boring í Lopra. Nú bert ein vika er eftir til feløgini skulu siga frá, um tey skulu vera við, hevur Texaco ikki tikið endaliga støðu. Bent Baumbach sigur, at teir arbeiða við málinum og eru sjálvandi sera spentir, hvat oljuídnaðurin annars fer at siga til Lopraboringina.

Eru fleiri onnur feløg áhugað, so verða vit eisini við sigur hann.

Freistin at geva boð til donsku fyritøkuna Dopas, um ein vil vera við í Lopraboringini í næsta ár er 1. desember. Dopas stendur saman við DGU og Oljufyrisitingini fyri projektinum, ið er mett at kosta einar 40 mill. kr.

Í løtuni roynir eisini føroyskt vinnulív at kanna, hvussu tað kann fáa lut í komandi Lopra-boringini.

**jan**

Map Of Licensed And 16th Round Nominated Acreage West Of Shetlands







*Kortið vísir, hvat bretar hava funnið nógva olju og vit síggja so Lopraholið hinumegin Hetlandsrennuna*